Álit

í

løgtingsmáli nr. 136/2020: Uppskot til løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin)

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, hevur lagt málið fram 13. apríl 2021, og eftir 1. viðgerð 15. apríl 2021 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 16., 19. og 22. apríl 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Maskinmeistarafelagið, Føroya Fiskimannafelag, Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Reiðarafelagið, Búskaparráðið, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Landsbankan, landsstýrismannin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, og landsstýrismannin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Magnus Rasmussen, Jákup Mikkelsen, Bill Justinussen og Jógvan Skorheim) vil vísa á, at samgongan í samgonguskjalinum hevur sett sær fyri at dagføra skipanina við veiðigjøldum. Skipanin við uppboðssølum bleiv avtikin við løgtingslóg um sjófeingi, sum varð samtykt av Løgtinginum 21. desember 2019. Hetta lógaruppskotið miðar eftir at fremja málið um at dagføra skipanina við veiðigjøldum soleiðis, at tey frameftir fylgja gongdini í vinnuni. Á hendan hátt kann fiskivinnan undir tryggum kørmum skapa virði til bæði land og vinnu.

Veiðigjøld fyri makrel, norðhavssild, svartkjaft og botnfisk í Barentshavinum eru í dag ásett í løgtinglóg nr. 172 frá 20. desember 2017. Talan er um veiðigjøld, har goldið verður eitt kilogjald fyri rættin at fiska hvørt fiskaslag. Higartil hevur tað verið soleiðis, at tað er Løgtingið, sum hevur ásett gjøldini fyri eitt ár í senn. Tað er hesa skipan vit vilja broyta.

Meirilutin vil eisini vísa á, at ein atfinning móti verandi skipan er lítla gjøgnumskygnið, hvussu gjøldini verða ásett, og hvørji gjøld og treytir eru galdandi fram í tíð. Hetta ger óvissuna í fiskivinnuni størri enn neyðugt, og ger tað trupult at leggja virksemið til rættis. Eisini hevur verið ført fram, at gjøldini verða ásett í mun til, hvat manglar á fíggjarlógini, og ikki í mun til støðuna í fiskivinnuni.

Hetta uppskotið miðar ímóti at fáa skipanina við veiðigjøldum í eina fasta legu til gagns fyri vinnu og fyrisiting. Lógaruppskotið leggur seg eftir, at veiðigjaldið frameftir verður tillagað eftir skipaðum viðurskiftum, sum fylgja umstøðunum í fiskiskapinum. Á tann hátt kann størri vissa fáast fyri, hvussu veiðigjaldið verður ásett frameftir, og minkar hetta um óvissuna í fiskivinnuni. Hetta ber við sær, at veiðigjøld framhaldandi kunnu vera eitt munagott ískoyti til landsbúskapin uttan at taka grundarlagið undan fiskivinnuni. Hetta, at veiðigjaldið frameftir verður tillagað eftir skipaðum viðurskiftum, sum fylgja umstøðunum í fiskivinnuni, heldur meirilutin vera skilagott. Hetta er tað, sum tosað hevur verið um í áravís, og sum nú gerst veruleiki.

Meirilutin hevði vónað eina breiða semju í hesum týdningarmikla máli, men tann semja bleiv ikki til veruleika. Samráðingar um veiðigjøldini vóru millum leiðslurnar í samgonguflokkunum og andstøðuflokkunum, har ymiskir møguleikar til eina møguliga semju vóru á lofti, men staðfestast

kann, at hesar samráðingar ikki bóru á mál, tíverri. Andstøðan boðaði frá í felags skrivi til samgonguna, at hon ynskti ikki at vera við í eini semju um veiðigjøldini. Ov langt var millum partarnar, og serliga er tað spurningurin um, hvussu nógv skal krevjast inn í veiðigjaldi, sum skilti partarnar.

Hóast onga breiða semju á hesum sinni um hetta týdningarmikla mál, so heldur meirilutin, at gott verður við einum veiðigjaldi frameftir, sum verður tillagað eftir skipaðum viðurskiftum, sum fylgja umstøðunum í fiskiskapinum. Hetta er ein munandi betri skipan enn tann, sum er galdandi í dag, har veiðigjaldið verður ásett fyri eitt ár í senn.

Vegna serligu umstøðurnar í fiskivinnuni síðan korona rakti, heldur meirilutin, at veiðigjald á makrel, norðhavssild og svarkjaft ikki eigur at verða lagt á veiðu eftir hesi løgtingslóg frá 1. august 2021 men frá 1. august 2022. Inntil 1. august 2022 verður sostatt mælt til, at veiðigjald á makrel, norðhavssild og svartkjaft framhaldandi verður álagt eftir ásetingunum í galdandi lóg.

Meirilutin setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

§ 15 verður orðað soleiðis:
"**§ 15.** Hendan løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2022.
Stk. 2. Veiðigjald á botnfisk í Barentshavinum er galdandi fyri veiðu landað frá og við 1. januar 2022.
Stk. 3. Veiðigjald á makrel, norðhavssild og svartkjaft er galdandi fyri veiðu landað frá og við 1. august 2022.
Stk. 4. Veiðigjald á makrel, norðhavssild og svartkjaft verður í tíðarskeiðinum frá og við 1. januar 2022 til og við 31. juli 2022 goldið eftir ásetingunum í løgtingslóg um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti í 2018, 2019, 2020 og 2021 og botnfiski í Barentshavinum í 2020 og 2021.
Stk. 5. Løgtingslóg um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti í 2018, 2019, 2020 og 2021 og botnfiski í Barentshavinum í 2020 og 2021 fer úr gildi 1. januar 2023."

Viðmerkingar:

Í mun til uppskot landsstýrismansins verður við hesari broyting veiðigjald á makrel, norðhavssild og svartkjaft eftir hesi løgtingslóg galdandi fyri veiðu landað frá 1. august 2022 og ikki frá 1. august 2021. Fram til 1. august 2022 verður veiðigjald á makrel, norðhavssild og svartkjaft ístaðin goldið eftir verandi skipan. Frá 1. august 2022 skal eingin rinda veiðigjald eftir verandi skipan, og tí verður ásett, at galdandi løgtingslóg verður sett úr gildi 1. januar 2023.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Aksel V. Johannesen, Páll á Reynatúgvu og Ruth Vang) tekur ikki undir við málinum. Fyriliggjandi uppskot er at rokna sum eitt veiðigjald fyri hvørt fiskað kilo, og ikki eitt tilfeingisgjald bygt á tilfeingisrentuna. Minnilutin hellir til seinna leistin at geva rættindaeigarunum avkast av sínum ognarluti.

Minnilutin er í høvuðsheitinum samdur við stigvísa leistinum, ið veiðigjaldið er snikkað eftir. Leisturin er einfaldur og fylgir prísgongdini hjá teimum ymisku fiskasløgunum. Lágir prísir geva eitt lægri veiðigjald, og hægri prísir geva eitt hægri veiðigjald.

Minnilutin er eisini samdur í, at vit bara eiga at taka veiðigjald av teimum fiskiskapum, har ein tilfeingisrenta er. Tá tað kemur til heimaflotan, kunnu vit nokk staðfesta, at har er ongin tilfeingisrenta. Tískil eigur heimaflotin ikki at rinda veiðigjald.

Tá tað kemur til Barentshavsflotan og ikki minst uppsjóvarflotan er ongin ivi um, at har hevur verið ein stór tilfeingisrenta seinastu árini. Tá ein tilfeingisrenta er til staðar, fáa veiðirættindini eitt stórt virði.

Spurningurin er, hvør skal hava hetta virðið. Tekur landið ikki alla ella størsta partin av tilfeingisrentuni inn, so fær loyvishavarin ein serstakan ella óvanligan stóran vinning, ella í ringasta føri verður tilfeingisrentan kapitaliserað, tá loyvi og veiðirættindi verða seld millum privat á privata marknaðinum. Tá eru tað tey, sum fara úr vinnuni, sum taka tilfeingisrentuna við sær, og tey sum koma inn í vinnuna rinda tilfeingisrentuna til seljaran og taka eina stóra skuld og harvið stóran váða á seg.

Minnilutin heldur tað hava stóran týdning, at vit taka størsta partin av tilfeingisrentuni inn í landskassan. Hetta av tvinnum orsøkum: at tilfeingisrentan kemur øllum Føroya fólki til góðar og at vinnan, sum frá líður, ikki verður ov skuldarbundin.

Uppskotið hjá landsstýrinum byggir ikki á nakrar útrokningar av, hvør veruliga tilfeingisrentan er. Tað er tó rættiliga sannlíkt, at tilfeingisrentan er munandi hægri, enn veiðigjøldini verða ásett til at verða í hesum uppskoti, tá prísirnir eru miðal og ikki minst tá prísirinir eru høgir. Samstundis kunnu vit staðfesta, at tá prísirnir fara í botn, er ongin tilfeingisrenta. Hóast hetta, so tekur uppskotið hjá landsstýrinum eitt veiðigjald frá fyrsta oyra.

Vinnan eigur at hava møguleika til vanligan vinning. Inntøkur til at rinda allar hýrur og útreiðslur, vinning til nýíløgur og eitt rímiligt avkast til eigarnar. Tá vinningurin er fleirfalt hetta, er tekin um eina tilfeingisrentu, sum landið eigur at taka størsta partin av til landskassan.

Fyrst av øllum, so eigur ein neyv útrokning at verða gjørd av tilfeingisrentuni. Ein útrokning, sum allir partar kunnu hava álit á. Tá tilfeingisrentan sveiggjar eftir gongdini í vinnuni, so eigur hendan útrokning at verða gjørd við jøvnum millumbilum. Veiðgjaldið eigur síðani at byggja á hesar útrokningar.

Minnilutin heldur, at í uppskotinum er veiðigjaldið sett ov høgt, tá prísirnir eru lágir. Veiðigjaldið er eitt sindur ov lágt tá prísirnir eru miðal høgir og alt ov lágt tá prísirnir eru høgir, tí tað er tá, at tilfeingisrentan er stór.

Minnilutin tekur tí ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 27. apríl 2021

Magnus Rasmussen formaður	Aksel V. Johannesen næstformaður	Jákup Mikkelsen
Bill Justinussen	Jógvan Skorheim	Páll á Reynatúgvu
	Ruth Vang	